# Suð hevur konsertir í Fríðriks- og í Christianskirkjuni



**Leygardagin 24. mars fer Suð at hava tvær kirkjukonsertir. Tann fyrra verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum kl. 17:00 og tann seinni í Christianskirkjuni kl. 20:00 sama dag**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Suð er kvinnukór úr Klaksvík, sum skjótt hevur fimm ár á baki. Tað er Steinvør Fonn, sum stjórnar. Tær hava fyri tað mesta sungið klassiskt, men hava eisini roynt seg innan pop, jazz, sangir úr ymiskum sangleikum o.a. Í des. í fjør framførdu tær alt Messias saman við Havnarkórinum og symfoniorkestri.

Til hesar konsertirnar fer Suð at syngja kendar sálmar og stutt klassisk stykki. Konsertirnar koma at vara um ein tíma hvør.

Aftur at a capella sangunum fer Suð hesa ferð at hava orgulfylgispæl til nakrar av satsunum. Tað er Petur Martin Johannesen, sum fer at hava orgulfylgispælið. Hann fer t. d. at spæla orgul til "Panis Angelicus", har Martha Mýri syngur solo, "Pie Jesu" hjá Andrew Lloyd Webber, har Unnur S. Fonn og Hallgerð Brim Joensen syngja solo saman við blandaðum kóri. Í hesum sambandi hevur Suð fingið nakrar menn at syngja við. Petur Martin fer eisini at spæla kenda og vælumtókta stykki "Air" hjá J. S. Bach á orgul.

Síðani eru tveir aðrir "Pie Jesu" satsir á skránni. Annar úr Requiem'inum hjá Fauré og annar úr Requiem'inum hjá Duruflé. Tað eru Unnur S. Fonn og Steinvør Fonn, sum koma at syngja solo, og afturat orglinum kemur Tóri Restorff Jacobsen at spæla celo til teir báðar satsirnar. Tóri fer eisini at spæla vakra satsin "Præludium" úr Cello suituni í G hjá J. S. Bach.

Tit kunnu lesa meir um Suð á www.sud.fo



# Pappommur í Oslo

Eftir at eina røð av neyðtøkum í norska høvuðsstaðnum, hevur ein bólkur av sniðgevum brotið upp úr nýggjum innan fyribyrging, loysnin er pappommur. Hóast hetta er eitt nýtt hugskot, so er tað í trá við onnur átøk í Oslo.

Eitt lið av sniðgevum hevur gjørt pappfigurar av 20 ymiskum ommum í veruligari støðd, og hesar eru settar upp kring Oslo, á støðum har vandi er fyri neyðtøkum. Ætlanin er, at neyðtøkumenn skulu kenna seg eygleiddar og fara at hugsa um sínar egnu mammur og ommur, soleiðis, at teir sleppa ætlanunum um at neyðtaka kvinnur, hetta skriva eb.dk.

Hóast hetta átak er nýskapandi, so er tað ikki fyrstu ferð, at man í Oslo ger heilt serlig fyribyrgjandi átøk. Fyri nøkrum árum síðan, fór kommunan í Oslo undir eitt átak, fyri at fáa fólk at dálka minnið í býnum og at brúka almennu ruskspannirnar. Hetta varð gjørt undir slagorðinum, "Når svinene går hem, kommer rotterne frem". Henda herferð byrjaði við, at Oslo borgarar vaknaðu til ein bý har rottubamsur stóðu á hvørjum gøtuhorni. Tann herferðin var sera væleydnað, og dálkingin eitt nú í vikuskiftum fall munandi. So er bert at vóna at ommurnar rigga líka væl sum rotturnar gjørdu.

*nud*

# Seyðahundakapping á Viðareiði





HUNDAR
*Tíðindaskriv*

Seyðahundakapping var á Viðareiði næstsíðsta leygardag, har 42 hundar luttóku. Hetta er tann stórsta kapping, sum nakrantíð hevur verið í Føroyum. Tað var nógvur vindur vestaneftir um morgunin, men út á dagin minkaði hann vindin, og tað bleiv stilli. Tað sá út ta einu løtuna, at tað fór at regna, men veðrið helt sær og kappingin var liðug kl 18:30.

Kappast var í klassa 1, 2 og 3. Síðani vóru steyp og heiðursmerkir handað til nr 1, 2 og 3 í hvørjum bólki, og tað var Karstin Hansen løgtingsmaður, ið handaði steypini.

Steypini vóru latin av Statoil, og teir hava latið steypini nú í trý ár, tað vil siga líka síðani byrjað varð at hava seyðahundakappingar í Norðoyggjum. Stigtakararnir Nils Absalonsen, Tróndur Petersen av Viðareiði og Jákup Jacobsen úr Haraldssundi takka øllum, ið hjálptu til við kappingini og gjørdu hetta møguligt.

## Øll kunnu innstilla evni til náttúru- og umhvørvisvirðislønina hjá Norðurlandaráðnum

VIRÐISLØN
*Tíðindaskriv*

Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins verður í ár latin fyri 13. ferð. Virðislønin, sum er 350.000 kr verður latin privatum ella almennum virki, felagsskapi ella einstaklingi, sum hevur víst serligt virkisfísni innan náttúru- og umhvørvisvernd.

Evnið fyri náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins í 2007 er

"Býur, ið er umhvørvisliga burðardyggur"

Virðislønin verður handað 31. oktober 2007 í sambandi við ársfund Norðurlandaráðsins í Oslo.

Øll kunnu innstilla evni til náttúru- og umhvørvisvirðislønina. Ítøkilig innstilling, sum skal skrivast á serstakt oyðiblað, skal vera dómsnevndini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin hin 27. apríl 2007. Adressan er: Nordisk Råds Natur- og Miljøpris, Nordisk Råd, Folketinget, Christiansborg, DK-1240 København K, har oyðibløð kunnu fáast, eins og tey kunnu fáast á web adressuni WWW.norden.org.